


## Danske Bank bíligast

Partabrøvini í Danske Bank eru tey bíligastu í Norðurlondum innan banka-partabrøv. Tað heldur Deutsche Bank, sum hevur broytt sítt tilmæli frá »hold« til »buy«. Týski fíggjarstovnurin sær nógv ljósari upp á niðurskrivingarnar hjá bankanum komandi árið og roknar við einum samlaðum niðurskrivings prosenti á 0,85 mótvegis konsensus á 1,20 á marknaðinum. Størsti vandin við Danske Bank partabrøvunum er, sambært Deutsche Bank, at bankin kann verða noyddur út í eina kapitalhækkan fyri at kunna afturgjalda tær 26 milliardirnar, sum bankin hevur lánt frá statinum gjøgnum Bankapakka II. Hetta kann, sambært metingini hjá fíggjarstovninum, merkja eina emissión upp á 15 milliardir krónur, sum svarar til 15 prosent av marknaðarvirðinum. Deutsche Bank hevur hækkað sítt kursmál til 151 krónur fyri partabrævið móti fyrr 134 krónur. Seint fyrrapartin í dag vórðu partabrøvini handlað 3,0% hægri til kurs 131, skrivar boersen.

# Oljan tríggjar fjórðingar frá markinum

**Eitt oljusamtak, sum Faroe Petroleum er partur av, hevur funnið kolvetni einans tríggjar fjórðingar frá føroyska markinum.**

OLJA

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Oljan nærkast føroyska markinum. Hetta ber til at lesa úr tíðindaskrivi, sum bæði Faroe Petroleum og eysturríkska oljufelagið OMV hava sent út í morgun. Samtakið hevur funnið kolvetni á Tornado leitimiðinum, ið liggur vestan fyri Hetland – góðar tríggjar fjórðingar frá føroyska markinum. Føroyska oljufelagið eigur 7.5 prosent av Tornado leitimiðinum.

OMV, ið er fyristøðufelag og loyvishavari við 35 prosentum, hevur borað Tornado leitibrunnin 204/13-1, sum liggur umleið 10 km í ein útnyðring frá Suilven oljukelduni og 30 km í ein útnyðring frá Schiehallion, Foinaven og Loyal framleiðsluleindunum.

Bæði olja og gass vórðu funnin í brunninum, og arbeitt verður í løtuni við upplýsingunum frá brunninum. Bæði tjúkdin og góðskan á jarðgoymsluni eru í tráð við forsøgnirnar undan boringini. Vegna jaliga úrslitið á brunninum, ætlar samtakið at bora ein síðusporsbrunn fyri at staðfesta støðd og kolvetnissløg á fundinum.

Brunnurin varð boraður á 1.048 metra havdýpi, og borað varð niður á 2.743 metra dýpi. Boriskipið Stena Carron varð nýtt til boringina.

Kostnaðurin verður lutfalsliga býttur millum loyvini P.1190 og P.1262. Umframt OMV og Faroe Petroleum, luttaka Dana Petroleum við 30 prosentum, Dong Energy við 20 prosentum, og Idemitsu við 7.5 prosentum.

Tornado er annað fundið á rað á Atlantsmótinum hjá Faroe Petroleum innanfyri




*Koritið vísir Tornado stutt frá markinum og annars tætt upp at tí sokallaða "Gullhorninum", sum møguliga nú fer at fáa endurreisn*




*Stena Carron, sum hevur gjørt fleiri týðandi boringar fram við markinum og sum nú fann olju í Tornadoleitimiðinum*

ein mánað. Í september kunngjørdi felagið, at gass varð funnið í Glenlivet brunnurin. Fleiri upplýsingar um Tornado úrslitið verða kunngjørdir, tá kanningarnar og síðusporsboringin eru liðug.

Aftaná Glenlivet og Tornado, heldur boriætlanin á Atlantsmótinum fram við Anne Marie oljuleitimiðinum á føroyskum øki og Cardhu og Lagavulin oljumleitimiðunum á bretskum øki. Hesir tríggir brunnarnir verða væntandi boraðir í 2010.

Sambært oljublaðnum Upstreym á netinum verður tosað um at binda eina útbygging av Tornado í oljuframleiðslu, sum longu finst í grannalagnum, her antin Foinaven ella Schiehallion.

Áhugavert er at merkja sær, at nýggja oljukeldan liggur einans umleið 15 fjórðingar frá Anne Marie leiðini, har borað verður um eitt hálvt ár. Oljufólk hava rættiliga stórar vónir til henda sjeynda brunnin á Føroyaøkinum og er ein møguleiki eisini, at knýta eitt møguligt oljufund her í framleiðsluútbúnað stutt frá á bretskum øki.

Við Tornadofundinum er ljóskastarin aftur av álvara settur á føroyska landgrunnin. Tornado eer triðja keldan, sum verður funnin heilt tætt upp at føroyska markinum. Hinar eru Cambo, sum onkrir eygleiðarar vilja vera við gongur tvørtur um markið og so Rosebank, sum eisini gongur tætt upp at markinum.

# Dollarin fellur og oljuprísurin hækkar

OLJUPRÍSUR

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Prísurin á olju er hækkaður teir síðstu dagarnar. Norðsjóvar oljan liggur á 73 dollarar fyri tunnuna í morgun. Hæksti prísurin fyri norðsjóvaroljuni var í august, tá prísurin náddi 75 dollarar fyri tunnuna.

Eygleiðarar halda, at tað eru tvær høvuðsorsøkir til hesa gongdina í løtuni. Tann eina er, at dollarin er lækkaður ta síðstu tíðina. Oljan verður handlað í dollarum, og tá so dollarin fellur hækkar prísurin vanliga á oljuni. Annars hevði oljan blivið bíligari, tá dollarin lækkar. Í mun til evruna og yenin, hevur dollarin ikki verið lægri enn tað sama teir síðstu 14 mánaðirnar, sambært Bloomberg.

Hin orsøkin sigst vera, at felagsskapurin OPEC hevur endurmett teirra metan fyri eftirspurninginum fyri næsta ár, og halda nú, at eftirspurningurin fer at økjast við sløkum 1% í 2010.

